nógv verri enn mannfólkini.

Tá tað kemur til vektina mugu vit eisini bara ásanna, at stóri trupulleikin við fiti eisini hevur rakt føroyingar. Sambært frágreiðingini hjá landslæknanum vísir ein Gallupkanning frá 2003, at annahvørt mannfólk og ein triðingur av føroysku kvinnunum eru ov feit. Sambært kanningini viga 44 % av føroysku mannfólkunum ov nógv, meðan heili 10 % hoyra heima í bólkinum "feitir". Til samanberingar kann nevnast, at 25 % av kvinnunum viga ov nógv, meðan 10 % verða mettar at vera alt ov feitar.

Hetta er bert nakað av tí, sum stendur at lesa í frágreiðingini frá landslæknanum fyri 2004. Men í hesum, eins og í fleiri øðrum førum vita vit lítið um orsøkirnar og møgulig sambond millum heilsustøðuna og liviumstøður annars.

### Tørvur á gransking

Í viðmerking til frágreiðingina vísir landslæknin á, at í Føroyum hevur lítið verðið granskað í sambandinum millum heilsu í mun til kyn, útbúgving og sosialan ójavnað. Ein slík gransking hevði eftir mínum tykki verið sera viðkomandi. Tí eiga vit eisini at gera ein innsats fyri at seta í verk skipaða gransking á hesum øki, heldur landslæknin.

Við atliti til miðallivialdurin eiga vit, sambært landslæknanum, eisini at seta í gongd víðfevnda gransking fyri at avdúka orsøkina til munin á miðallivialdrinum hjá kvinnum og monnum. Eisini kundi tað verið áhugavert at avdúka møguligar orsøkir á muninum á livialdri í mun til sosiala støðu í samfelagnum. Slík gransking hevði hartil verið gagnlig, tá tað ræður um fyritíðarpensjón, mist liviár áðrenn 65 ára aldur, sjálvmetta heilsustøðu, kroniskar sjúkur, sosialan ójavnvág í lívsgóðsku, royki og drekkivanar, rørslu, BMI tøl umframt sosiala isolatión millum tey gomlu, sigur landslæknin í viðmerkin til frágreiðingina fyri 2004.

Í komandi bløðum fara vit at greiða gjøllari frá ársfrágreiðingini hjá landslæknanum við viðmerkingum frá viðkomandi pørtum.

# Býarmenningin II: Tórshavn: 1955-2005

Á áhugaverdari framsýning í Smiðjuni í Lítluvík 25. - 31. juli ber til at síggja, hvussu Havnin av álvara tók at vaksa miðskeiðis í 20. øld og fram til í dag.

Lítil ivi man vera um, at Havnin sum vit kenna hana í dag, er nógv broytt ta seinastu hálvu øldina. Í 1950inum búðu einans 5.600 fólk í Havn - samanborið við umleið 19.000 í dag. Hetta hevur sjálvsagt havt árin á Havnina, bæði við atliti at sethúsa-, vinnuliga- og kommunala bygging. Somuleiðis hevur menningin sett stór krøv til sokallaða undirstøðukervið - t.d. planlegging av vegum, útgrevstrum, vatnveitingum osfr.

Við myndum, kortum, tekningum, skjølum og tølum verður víst á, hvussu býurin hevur flutt seg og hvussu fólk í Havn hava hugsað, tá ið tey hava søkt um byggiloyvi til sethús og umbyggingar. Eisini eru umsóknir frá handlum og fyritøkum og almennum stovnum.

Á framsýningini ber til fáa innlit í, hvussu býurin á ymsan hátt vaks í 1950-árunum og hvussu byggivinnan veruliga tók dik á seg í 1960-árunum. Somuleiðis er við 1970-árunum, tá ið bæði kommunalar og privatar útstykkingar vórðu ætlaðar, meðan størri - og mangan øðrvísi bygging - tvíhús og randarhús o.a. sóust í 1980-árunum og fram til búskaparkreppuna fyrst í 1990-árunum.

Framsýningin gevur ikki bert eitt søguligt baksýni. Til ber nevniliga at síggja ymiskar framtíðarætlanir sum byggi- og býarskipanardeildin í Tórshavnar kommunu hevur arbeitt við.

Tað eru Landsskjalasavnið og Býarsavnið, sum í felag standa fyri framsýningini í Smiðjuni í Lítluvík. Evnið í ár er framhald av framsýningini hjá søvnunum báðum í fjør, tá býarmenningin í tíðarskeiðnum 1856 til 1954 varð víst fram.

Framsýningin í Smiðjuni í Lítluvík er opin í døgunum 25. - 31. juli. Allar dagar frá klokkan 14.00 til 20.00.

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



## Marknaðirnir í summarhýri

Friðarligt er á virðisbrævamarknaðum um okkara leiðir, nú summarferian er í hæddini. Oljan er tó framvegis í andglettinum, tí oljuprísurin liggur enn tætt við methøga stigið frá farnu viku, og veðurtíðindi benda á, at ódnir fara at herja nakað enn. Hetta kann darva oljufremleiðsluni. Roknskapartíðindir hava eisini ávirkað og ført við sær vinningsstaðfestingar. Yvirgangurin og yvirgangsætlanir herja framvegis, men hetta hevur ikki nervað fíggjarheimin stórvegis enn.

### Lánsbrævarentur at kalla óbroyttar

Sera friðarligt hevur verið á lánsbrævamarknaðunum. Seinastu vikuna eru donsku renturnar at kalla óbroyttar. 2-ára rentan er 2,20% og 10-ára rentan er 3,21%. Hetta merkir, at 10-ára rentan er hækkað 0,14%-stig seinasta mánaðin tá 10-ára rentan var 3,07%. Hóast rentan er hækkað, metir Kaupthing ikki, at rák við hækkandi rentum er væntandi enn.

### Í høvuðsheitinum góðir roknskapir

Higartil hava útvið 200 av teimum 500 virkjum í týdningarmikla S&P 500 vísitalinum kunngjørt roknskap. 70,7% av virkjunum hava kunngjørt betri inntøkur enn væntað, samstundis sum veruligu inntøkurnar eru hækkaðar útvið 12% í mun til árið fyri. Millum feløgini, ið hava kunngjørt góðar roknskapir seinastu vikuna eru McDonalds, IBM og Motorola. Hóast bæði Intel og Yahoo! eisini kunngjørdu góð inntøkutøl, so lækkaðu teirra partabrøv eftir kunngerðina. Intel lækkaði tí at sølan, og Yahoo! lækkaði tí inntøkurnar "einans" vóru sum væntað.

### Hesa vikuna

Fleiri áhugaverd lyklatøl, m.a. BTÚ tøl úr USA, verða kunngjørd hesa vikuna. Nú oljuprísurin liggur á methøgum stigi, verður hugt neyvt eftir, um oljan hevur tálmað búskaparvøkstrinum. Í andglettinum eru tíverri eisini yvirgangur, ið enn ikki hevur havt nakra serliga ávirkan á marknaðirnar. Hesa vikuna kunngerða fleiri av stóru oljufeløgunum, umframt t.d. Siemens, Deutsche Bank og Texas Instruments roknskap. Ein áhugaverd vika er fyri framman, men væntað verður ikki, at rentur og partabrøv fara at flyta seg stórvegis.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 618,64 | -0,2% |
| JPY | 5,56 | 0,6% |
| GBP | 1.075,77 | -0,9% |
| NOK | 93,77 | 0,0% |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 104,23 | 0,0% |
| Evra Lánsbrøv | 175,09 | -0,1% |
| Norrøn Partabrøv | 96,90 | -0,4% |
| Altjóða Virkisar | 66,48 | -0,5% |

Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.